# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hondbólts-HM í Sosialinum

Nú føroyska hondbóltskappingin er komin í helvt verða dyrnar bráddliga latnar upp til altjóða hondbólt í heimsflokki. Heimsmeistarakappingin í hondbólti fyri menn stendur á skránni, og tað er givið, at hon fer ikki bert at vera ein frálíkur íblástur til okkara egnu heimligu hondbóltsspælarar í øllum aldri, men hon fer so sanniliga eisini at vera gott og spennandi undirhald fyri eina fjøld av føroyskum sjónvarpshyggjarum.

Sosialurin, sum nú í mong ár, trúliga hevur roynt at fylgt heimligu kappingunum, ætlar sær ikki at liggja sjóvarfallið av sær. Vit fara at bjóða okkara lesarum tilfar undan hesi HM kapping og fylgja henni sohvørt.

Tað at fleiri av okkara grannatjóðum eru við í kappingini ger hana ikki minni áhugaverda. Her er bæði talan um íslendingar, norðmenn og danir fyri bert at nevna nøkur av londunum, sum fara at kappast um tað størsta av øllum innan heimshondbóltin, heimsmeistaraheitið.

Umframt at kunna stimbra okkara egnu kappingar og geva spælarum gott í "beinið", so er manshondbóltur á hægsta altjóða støði nakað av tí besta sjónvarp kann bjóða, tá tað snýr seg um ítrótt og kapping. Her er hvørt sekund áhugavert og avgerandi. Frá byrjan til enda.

Kend føroysk hondbóltsandlit fara at gera viðmerkingar, soleiðis at vit eisini fáa føroyskar vinklar uppá hesa kapping. Gera hana heimliga og ja, rætt og slætt gera hana til tað góða blaðtilfar, sum hon eisini er. Vit fara eisini at heita á okkara lesarar um at koma við sínum viðmerkingum til komandi HM hondbóltsbløð. Kappingin byrjar 21. januar men leggja vit í vaðið nakað væl áðrenn. Vit kunnu so bert ynskja øllum eina góða kapping og góðar upplivingar.

**Sosialurin**

## Sambandsflokkurin tekur sær ikki æruna

**SAMBANDSFLOKKURIN**
Kaj Leo Johannesen



Tingmenn úr bæði samgongu og andstøðu eru farnir at kjakast um, hvør skal hava æruna av tí, sum er hent viðvíkjandi Vága Floghavn. Hetta má sigast at vera eitt løgið kjak, tí í veruleikanum er einki hent á økinum.

Í samgonguskjalinum, sum varð undirskrivað fyri trimum árum síðani, stendur: "Vága Floghavn verður útbygd og nútímansgjørd." Hetta er ein góður málsetningur, men sum so mangan, tá tað snýr seg um politisk mál, so hevur hetta tikið nógv longri tíð enn tey flestu høvdu ynskt.

Undanfarna landsstýrissamgonga hevði eisini í sínum samgonguskjali ætlanir um útbyggingar og nútímansgerð av Vága Floghavn, men heldur ikki tá hendi nakað sjónligt framstig.

Trý ár eru farin av hesum valskeiðinum, og nú sær endiliga út til, at eitt uppskot er á veg í fólkatingið um at fáa útbyggingina framda. Men tað løgna er, at nú er eisini ein kapprenning farin í gongd, um hvør skal hava æruna fyri framstigini – longu áðrenn nakað veruligt framstig er hent. Vit kunnu so spyrja, hvør vil hava æruna fyri alt tað sum ikki er hent, ella æruna fyri, at arbeiðið hevur tikið so langa tíð?

Sambandsflokkurin fer ikki einsamallur at taka sær æruna av framstigunum, sum nú vónandi henda viðvíkjandi Vága Floghavn. Vit arbeiða saman við tveimum øðrum flokkum eftir einum samgonguskjali, og vóna, at eitt samt løgting í seinasta enda stendur aftanfyri tey úrslit, sum fáast burturúr.

Endamálið er ikki at byggja okkum sjálvum ein politiskan minnisvarða. Vit ynskja bara at føroyingar fáa ein tryggan og góðan flogvøll.

## Samkomur og kirkjur til løgtingsvalið

**JOHN WILLIAM JOENSEN**
Formaður í Norðoya Sambandsfelag



**Tað hevur ongin trupulleiki verið hjá føroyingum at hildið politik og samkomulív toluliga atskilt – men seinastu árini hava politikarar alt meira og meira brúkt kristiligar fundir, til politiska tileggjan**

Sum eitt dømi kann eg nevna at stutt undan seinasta løgtingsvalið fór ein av formonnunum í føroyskum politiskum flokki undir eina møtirøð kring um í landinum.

Eftir mínum tykki var hetta at fara út um mark. Tað eg sjálvur kenni til samkomulív, so hava politikarar undan valinum hildið seg frá at tikið orðið á samkomufundum, hóast teir sjálvandi í øðrum sambandi hava kítt seg fyri at fingið undirtøku.

Fólk, sum ganga á møti og annað slag av kristiligum fundum eru sjálvandi eisini politiskt áhugað. M.a. minnist eg tá fyrrverandi fiskimálaráðharrin í beinleiðis sjónvarpssending sást grátandi á tingfundi. Tá var tað onkur, sum á bønarmøti mánakvøld reistist og bað beinleiðis fyri landsstýrismanninum og familju hansara.

**Eru ikki nøgd við gongdina.**

Tað er tó eingin loyna, at tá ein í dag fer til samkomufundir og møtir, so er ikki at misskilja, at tað er ein sjónlig misnøgd við tey mál, sum í seinastuni hava fylt alt tað politiska rúmið. Flestu prædikur siga tað ikki beinleiðis, men boðskapurin er, at tey virði, sum samkomur og kirkjur standa fyri, í dag ikki vera hoyrd í politiska systeminum.

Hetta er eisini ein trupulleiki hjá føroysku flokkunum, tí stórur partur av føroyska fólkinum gongur regluliga í kirkju og á møti, og hava tey kristiligu virðinum nær at hjartanum.

**Áheitan**

Sum formaður í politiskum lokalfelag fari eg at heita á samkomu- og kirkjuleiðara um at taka omanfyrinevnda spurning til viðgerar, og vil eg mæla til, at tá komandi valstríð er í hæddini, skulu tey, sum eru uppstillað til løgtingið, í nakrar vikur sita millum áhoyrarar og ikki læra á prædikustólinum.

- Tað er umráðandi at vit øll luttaka í politiska orðaskiftinum, men tað er meira umráðandi at evangeliið verður framborið til føroysku tjóðina, eisini eftir at løgtingsvalið hevur verið. Politikkur hevur tað við at seta fólk í bás, men boðskapurin um uppreisn Kristusar frá deyða er í beinleiðis andsøgn til hetta.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.